# Diddan úr Havn fekk Obama

**Í august høvdu vit eina samrøðu við Elspu Ellis, vanliga kallað Diddan, úr Havn. Hon er búsitandi í California, og hon skuldi tá heim at luttaka í stríðnum at fáa Barack Obama valdan til forseta. Vit hava ynskt henni tillukku við valinum og hava frætt aftur**



*Diddan th. saman við vinkonu síni Mary Olsen. Tær komu at kennast í California, har Mary og maður hennara Knút eisini búðu. Knút stuðlaði Nixon og Reagan, men tað vóru tey líka góður vinir fyri tað*

FORSETAVAL
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Diddan er dóttir Onnu f. Samuelsen, ættað úr Lorvík, og Otto Brimheim í Havn.

Hon kom á fyrsta sinni til USA 20 ára gomul í 1965 sum aupair genta hjá eini familju í høvuðsstaðnum Washington.

Maðurin í húsinum var ráðgevi hjá Joe Tydings, sum var limur í senatinum fyri demokratiska flokkin.

Hetta heim var tískil sera nógv merkt av politikki. Diddan kom hesa tíðina at fáa eitt gott innlit í amerikanskan politikk. Hon fekk "pass" til senatið og plagdi at síggja Kennedybrøðurnar Edvard og Robert og aðrar kendar politikkarar. Robert stílaði jú eftir at gerast forseti í 1968, men hann varð myrdur. Edvard er framvegis limur í Senatinum. Eisini fekk Diddan atgongd til hægstarætt og slapp tá eisini at síggja, hvussu amerikanska rættarskipanin virkaði.

Hetta skapti ein serligan áhuga fyri politikki hjá Didduni, og hon gjørdist ein sannførdur stuðul hjá Demokratiska flokkinum.

Diddan giftist við einum amerikanara. Í fyrsta umfari búsettust tey í Kansas City, men tey fluttu til California í 1974, har hon enn býr.

## Stuðlaði fyrst Hillary og síðan Obama

Diddan er framvegis ein íðin stuðul hjá demokratiska flokkinum. Hon er ikki amerikanskur ríkisborgari og kann tí ikki sjálv velja. Men hon kann sannføra onnur. Í fyrsta umfari hevur tað verið hennara egnu børn, sum eisini taka undir við hennara flokki.

Til hetta forsetavalið var Diddan í fyrsta umfari stuðul hjá Hillary Clinton, sum upprunaliga var favorittur at gerast demokratiskt forsetavalevni.

Diddan var eisini á veljarafundi saman við Hillary og hevur heilsað uppá hana. Hon var eisini rættuliga imponerað av Hillary, sum hevði eina framløgu uppá ein tíma uttan manuskript á fundinum. Aftaná vóru spurningar, og hon stóð ikki føst í nøkrum teirra.

Hillary vann í California og øðrum stórum statum, men hetta var ikki nóg mikið.

Tað varð sagt, at nógvir Clinton-stuðlar heldur fóru at velja McCain enn Obama til forsetavalið. Men hetta var so ikki galdandi fyri Didduna. Hon stuðlaði nú Obama av heilum huga.

Hjá henni var tað sera umráðandi at fáa ein demokrat til forseta. Tað skal eisini sigast til rós fyri bæði Bill og Hillary Clinton, at tey vóru góðir taparar og bakkaðu Obama upp 100%. Tað vóru ikki øll, sum roknaðu við hesum at byrja við.

Diddan helt, at USA hevur nú í átta ár eftir hennara tykki havt ein ódugnaligan forseta, hvørs høvuðsavrik hevur verið at bróta niður ta lóggávu, sum demokratarnir hava bygt upp í ártíggir. Demokratiski flokkurin hevur staðið fyri teimum nýskipanum til verju av borgarunum, sum eru framdar á lóggávuøkinum í USA heilt aftur til Roosevelt í 1930-unum.

Kríggið í Irak hevur verið ein vanlukka, sum var grundað á ósannindi hjá Bush og hansara monnum. Hetta hevur eisini gjørt heimin nógv ótryggari.



## Skitið valstríð

Eitt er at gerast valevni. Eitt annað er at verða valdur. Amerikansk valstríð eru kend fyri at vera sera skitin, og serliga er hetta galdandi fyri republikanska høgravongin, har einki vápn er ov groft.

Tað vanliga er at grava í fortíðina hjá einum valevni at finna okkurt at brúka móti viðkomandi. Onkuntíð hevur verið sagt, kanska í skemti, at ein persónur, sum ikki hevur okkurt lík í lastini, er ov keðiligur til at kunna verða valdur!

"Trupulleikin" var bert tann, at Obama hevði einki lík í lastini. Tað kundi ikki finnast meira enn, at hann hevði verið í stovu við ein mann, sum hevði staðið fyri yvirgangi, tá ið Obama var átta ára gamal, og so navnið, sum minnir eitt sindur ein Osama! Fyri ikki at tala um millumnavnið Hussein.

Tað komu út tríggjar bøkur í summar, hvørs endamál var útspilling av Obama. Tá einki annað var, varð koyrt fram við tilvitandi ósannindum. Ein av hesum var, at Obama er muslimur. Fólk eru so óupplýst, at nógv trúgva tí, hóast Obama alment er kristin. Men hetta hevði ongan ávirkan, og er tað eitt gott tekn um, at fólk ikki longur lurta eftir slíkum

## Kristni høgravongurin fingið frammaná

Vanliga er tað tann kristni høgravongurin í USA, sum stendur fyri tí skitna partinum av valstríðnum. Trupulleikin hjá MacCain var, at hann var ikki meira enn "vanligur" kristin. Hann er eisini sum so eitt hampafólk, og skitin vápn liggja ikki til hansara.

Men so valdi hann sær Sarah Palin, sum kemur úr eini víðgongdari samkomu í Alaska. Tað var hon, sum kom at standa fyri tí skitna partinum av valstríðnum, sum MacCain ikki troystaði sær. Tað var á hennara valfundum, at fólk stóðu og róptu: Obama, Osama, Obama, Osama….. og annars róptu ókvæmisorð eftir Obama.